**LAGT TIL RÆTTIS:** Inna Törnroos
**MYNDIR:** Jens Kristian Vang



*Sonja í Hoyvík hevur nýtt blondir til tess at fáa flotta, svarta, silvurmynstrið á kjálkanum hjá Elin Winther Holm. Grønu fjaðrarnir gera prikkin yvir i'num.*



*Anna Marie Hentze hevur fingið íblástur til sínar litir frá eini mynd, hon hevur funnið á netinum. Perlurnar, sum hon hevur klistrað á kjálkan hjá Honnu Clementen, hevur hon keypt í ítrivshandli.*



*Helena Madsen hevur gjørt fuglalíku sminkuna hjá Kristinu G. Jacobsen. Kristina gremur seg eitt sindur um, at hon onki sær fyri teimum longu, eyka vippunum.*



*Barbara Rasmussen stríðist fyri at náa deadline. Modellin Oddvør Vang gerst tó liðug og hevur eitt flott, øðrvísi »look« við myrkum eygum og hvítum andlitið.*



*Guðrun Magnussen hevur ein ljósareyðan parykk við til sína modell, Eivi Bistopstø, og ger allar hinar øvundsjúkar. – Mær dámar væl at nýta nógvar litir, sigur hon.*

# Fantasifullar GRÝLUR

Á **TEKNISKA SKÚLA** ERU TEY Í GRÝLULAG. FLOKKURIN, IÐ ÚTBÚGVIR SEG TIL **MAKE-UP-ARTISTAR** OG STYLISTAR HEVUR **»FANTASY«** Á TÍMATALVUNI, OG SKIFTAST TÆR UM AT GERA HVØRJA AÐRA TIL FLOTTAR, GLITRANDI **GRÝLUR**.



*Sunneva Thorsteinsson er meir enn nøgd við næmingarnar. – Minst til at hetta er fyrstu ferð tær hava »Fantasy«-make-up, sigur hon.*